# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu tá kæri maður, pápi, abbi og verfaðir okkara

**Heini Joensen**
Svínoy

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri troystarrík orð í kapellinum og kirkjuni. Takk til starvsfólk á dialysudeildini á Landssjúkrahúsinum, starvsfólk á Tyrlutænastuni, Poul í Auto, Umlættingarheimið og peningagávur til góðar fyri dialysusjúklingarnar. Takk kirkjutænarar, berarar og gravarar.

Takk øll tit, sum fylgdu Heina til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Fríðgerð, Heri og Anna Jórun**

**Føðingardagur**
Fríggjadagin 10. november fyllir Mathilda Eliasen, Mikladalur, 50 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin heima hjá henni.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður og beiggi okkara

**Kristian Edvard Rókstein**
Fuglafjørður

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri blómur, kransar og peningagávu til Siloa. Tøkk til Ellis- og Røktarheimið og B7, fyri tíðina hann var har og tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Thala og Karin**

## Móttøka

**Í sambandi við at Laura Poulsen hevur 30 ára starvsdag verður boðið til móttøku á Føroya Barnaheimi 10. november frá kl. 15.00 til 17.00.**

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Onnu Nielsen, Klaksvík**, fer úr heiminum á Biskopstøð í Betesda í kvøld kl. 18. Jarðarferðin verður úr Betesda mikudagin kl. 13.30. Tey, ið ynskja at lata blómur ella krans kunnu í staðin lata eina gávu til trúðboðarnir gjøgnum Akurin. Konto í peningastovunum.

Kistan við **Jacob Paula Jónsson í Trongisvági**, vanliga nevndur Palle, fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúrkshúsi mikukvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju hósdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Palla, kunnu lata Tvøroyrar kirkju eina gávu.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Anna Nielsen**
Klaksvík

andaðist sunnudagin 5. november, 86 ára gomul.

Farið verður úr heiminum oman í Betesda týskvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Betesta mikudagin kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*

**Jona, Kristianna, Begga og Victor**

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

MÓTTØKA

Í SAMBANDI VIÐ AT FUGLAFJARÐAR KOMMUNA HEVUR SETT SOSIALU DEILD Á STOVN, BJÓÐA VIT TIL ALMENNA MÓTTØKU Í HØLUM STOVNSINS.

KARVATOFTIR 4B Í FUGLAFIRÐI

FRÍGGJADAGIN TANN 10. NOVEMBER 2006

FRÁ KL. 14.00 – 17.00

**Dagurin í morgin**

**8. november. Claudius**, deyður umleið ár 300. Steinhøggari, sum saman við fýra øðrum steinhøggarum altíð risti kross í tey arbeiði, hann legði úr hondum. Tá ið hann og felagar hansara noktaðu fyri at høgga myndir av skurðgudum, læt keisarin Diocletianus teir taka av døgum.

i
Sosialurin

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum mintust meg á 90 ára føðingardegnum við vitjanum, samrøðum, fjarritum og gávum

**Heilsan Sofus Gregersen, Syðrugøta**

## Tøkk

Hjartaliga tøkk til tykkum, sum heiðraðu meg á 80 ára degnum. Stóra tøkk til tykkum í Elim, sum gjørdu alt á so fyrimyndarligan hátt og útvegaðu alt sum skuldi til. Tøkk til tykkum úr Íslandi, tað var ikki smávegis fyrilagt.

Takk til Kvartettina í Betesda, við spælimonnum, tað var óvæntað og gleðiligt. Takk fyri gávur, blómur og telegram, bæði frá fjar og nær. Takk fyri talur og góð ynski. Túsund takk til tykkum mongu, sum komu í Elim. Harrin signi tykkum øll.

**Dávur Jacobsen, Søldarfirði**